# Hans Kristian bjóðar John av



**Við at vinna á Eyðuni Nolsøe er unglingurin úr Kollafirði á odda saman við John Rødgaard, sum vann á Rana Nolsøe**

TALV
*Jóannes Hansen*

Í amerikanskum politikki hava teir hugtakið "Super Tuesday". Hetta hevur við uppstillingina til forsetavalið at gera. Síðani 1988 hava nógvir av Suðurstatunum – upp í sekstan – hildið uppstillingarval annan týsdagin í mars. Stórur áhugi hevur verið fyri hesum degnum. Um ein og sami kandidatur megnar at gera seg væl galdandi í øllum ella nógvum statum, so verður sagt, at hann hevur góðan møguleika at vinna í statunum, sum koma aftaná og harvið at gerast forsetavalevni.

FM í talvi fyri einstaklingar er sjálvandi bæði so og so nógv øðrvísi enn uppstillingarvalini til forsetavalið í USA. Men hugatkið "Super Tuesday" hava teir í ár fingið til Sandavágs.

Undanfarnu árini hava tey níggju umførini verið frá fríggjadegi og til páskaaftan. Hesa ferð varð fyrsta umfarið telvað leygardagin. Tí so at siga manglaði ein dagur í. Tí vóru tvey umfør á skránni í gjár, og tað var orsøkin til, at føroyski talvheimurin um vikuskiftið fór at tosa um henda øgiliga týsdagin.

## Einki hongur longur

Undanfarnu árini hevur tað ofta verið soleiðis, at eitt ella fleiri talv hava hingið frá undanfarnu døgunum. Hesi hava so verið telvað liðug fyrrapartarnar. Nú eru reglurnar broyttar soleiðis, at einki talvið hongur longur.

Telvararnir hava tveir tímar í part til teir fyrstu fjøruti leikirnar. Síðani hava teir ein tíma í part til tjúgu leikir, og so hava teir ein hálvan tíma í part til at gera talvið liðugt í. Tað vil við øðrum orðum siga, at mesta tíðin, sum kann brúkast til eitt talv, er sjey tímar. Og so er lætt at rokna út, at í gjár bar tað til hjá telvarunum at siga fjúrtan tímar við talvborðið. Hvussu tað gekk við tí, venda vit aftur til í morgin.

Sum vit søgdu í blaðnum í gjár, so hittust telvararnir soleiðis í gjár. Í fjórða umfarinum fyrrapartin: Terji Petersen–Hans Kristian Simonsen, Rani Nolsøe–Olaf Berg, Eyðun Nolsøe–Martin Poulsen, Ólavur Simonsen–Carl Eli Nolsøe Samuelsen og John Rødgaard–Torkil Nielsen. Í fimta umfarinum seinnapartin: Martin Poulsen–Terji Petersen, Hans Kristian Simonsen–Rani Nolsøe, Olaf Berg–John Rødgaard, Carl Eli Nolsøe Samuelsen–Eyðun Højgaard og Torkil Nielsen–Ólavur Simonsen.

## John og Hans Kristian á odda

Undan stóra týsdegnum vóru tað elsti og royndasti maður, John Rødgaard, og unglingurin Hans Kristian Simonsen, sum vóru á odda. Eftir trý tey fyrstu umførini høvdu teir 2 1/2 stig í part.

Í triðja umfarinum telvaði John Rødgaard ímóti 1997 meistaranum Rana Nolsøe. Talan var um sera javna støðu, tá Rani við hvíta fólkinum skuldi gera 40. og síðsta leikin, áðrenn teir skuldu fáa nýggja tíð tillutaða. Ein sovorðin leikur plagar ikki at vera serliga ógvusligur – hvørki ein veg ella annan – men Rani setti eina finnu í deyða, og tað ger eingin ósektaður á hesum støðinum. Tí vann John Rødgaard lættliga við svarta fólkinum.

Eftir tvey tey fyrstu umførini var Eyðun Nolsøe einsamallur á odda. Í triðja umfarinum hevði hnn svarta fólkið ímóti Hans Kristiani Simosnen. Unglingurin úr Kollafirði, sum gjørdist eitt kent føroyskt talvnavn og andlit, tá hann syfti sjálvum Kasparov, hevur síðani tá ferð eftir ferð staðfest, at hann hevur frágera góð evni at telva, og hann tykist eisini hava sinniliga yvirskotið, sum skal til. Hans Kristian vann á Eyðuni. Harvið vóru undan stóra týsdegnum John Rødgaard og Hans Kristian Simonsen á odda.

Nú valdast um, hvussu tað spældi av í gjár. Men í Sandavági eru teir við spenningi farnir at hyggja fram ímóti sjeynda umfarinum, sum er á skránni skírisdag. Tá skal Hans Kristian við hvíta fólkinum telva ímóti John Rødgaard. Av góðum grundum hevur Hans Kristian Simonsen ongantíð vunnið FM í landsliðsbólkinum. Tað hevur John Rødgaard roynt tvær ferðir – í 1998 og í 2001.

## Ungu menninir væl við

Umframt John Rødgaard er Torkil Nielsen mest royndi maðurin í FM kappingini hesa ferð. Torkil vann í áttati árunum FM tríggjar ferðir – í 1984, 1986 og í 1988. Seinastu árini hevur hann ikki tikið so nógv lut, men nú nýtir hann høvið á heimavølli at royna seg eina ferð enn.

Undan týsdegnum hevði hann ikki vunnið, men hann hevði heldur ikki tapt. Ímóti einum av ungu monnunum, Carl Eli Nolsøe Samuelsen, fekk hann í triðja umfairnum remis.

Fleiri av hinum ungu monnunum vóru undan gjárdegnum so mikið væl við, at tað væl kundi hugsast, at teir kundu fara at gera seg galdandi. Her verður hugsað um Olaf Berg, Martin Poulsen og Ólavur Simonsen. Eingin av teimum hevur áður vunnið FM. Ólavur var ikki serliga heppin í fyrstu umførunum, men við sigrinum við svarta fólkinum á Martini Poulsen, kom hann upp á síðuna av Martini og Olafi. Hesin síðsti vann í triðja umfarinum á Terja Petersen, sum eftir trý umfør var einasti maður uttan stig. At koma afturíaftur eftir soltna byrjan, er ofta sera torført.

## Upp og niður

Úr Sandavági frættist, at telvararnir so at siga spilla ikki tíðina burtur. Talvini, tá støðan eftir fáar leikir og harvið stutta tíð, eru avklárað, eru fá. Í flestu førum verður størsti parturin av teimum sjey tímunum brúktur, og tá er tað ofta ikki fyrrenn í tíðarneyðini, at tað koppar annan vegin.

Miðal styrkistalið í landsliðsbólkinum er 2141. Seks av teimum telvarunum, sum hava hægstu styrkistølini, eru ikki við hesa ferð. Her verður hugsað um John Arna Nilssen, Heina Olsen, Flóvin Þór Næs, Rógva W. Rasmussen, Jens Kristian Hansen og Torbjørn Thomsen. Tá vit fregnast eftir, hvussu teir meta um støðið í kappingini hesa ferð, verður sagt, at tað er eitt sindur upp og niður. Onkuntíð hevur tað verið hægri. Fyrstu umførini hava verið merkt av nervum og mistøkum í tíðarneyðini, sum flestu hava verið í.

**3. umfar**

Rani Nolsøe–John Rødgaard 0–1
Olaaf Berg–Terji Petersen 1–0
Hans Kristian Simonsen–Eyðun Nolsøe 1–0
Martin Poulsen–Ólavur Simonsen 0–1
Carl Eli Nolsøe Samuelsen–Torkil Nielsen 1/2–1/2

**Støðan eftir trý umfør:**

| | | |
|---|---|---|
| John Rødgaard | VT | 2 1/2 stig |
| Hans Kristian Simonsen | KT | 2 1/2 stig |
| Eyðun Nolsøe | KTF | 2 stig |
| Olaf Berg | HT | 1 1/2 stig |
| Torkil Nielsen | ST | 1 1/2 stig |
| Martin Poulsen | HT | 1 1/2 stig |
| Ólavur Simonsen | KTF | 1 1/2 stig |
| Rani Nolsøe | KTF | 1 stig |
| Carl Eli Nolsøe Samuelsen | HT | 1 stig |
| Terji Petersen | KTF | 0 stig |

# Fleiri framvegis fult

**Klaksvíkingar eiga tríggjar teir fremstu í unglingadeildini og fremsta mannin í almenna bólkinum**

TALV
*Jóannes Hansen*

Klaksvíkingar hava stóran áhuga í talvi, og ungu menninir fáa góða venjing har norðuri. Tað sást aftur í luttøkuni í FM fyri einstaklingar – ikki minst í unglingabólkinum. Í hesum bólkinum eru 26 luttakarar. Átta umfør eru á skránni, og eitt umfar er á skránni hvønn dagin fram til og við páskaaftan.

Eftir trý tey fyrstu umførini vóru tað tveir telvarar, sum høvdu fingið fulla úrtøku. Teir vóru Rúni Dragaberg og Ebbe F. Petersen. Teir eru báðir úr Klaksvíkar Talvfelag. Tað er Rani Baldursson eisini. Hann hevði eftir trý umfør 2 1/2 stig og var einsamallur á triðja plássinum. So fæst at síggja, hvussu tað fer at hilnast. Í fjør var Rúni Dragaberg leingi á odda, men hann kiksaði fram ímóti kappingarenda.

Tá unglingarnir verða umrøddir, eigur at verða lagt afturat, at í landsliðsbólkinum eru tríggir luttakarar, sum hava aldur at kappast í unglingadeildini. Men rímuligt vilja Hans Kristian Simonsen úr Kollafirði og havnamenninir Olaf Berg og Martin Poulsen heldur kappast, har teir hava møguleika fyri størstu avbjóðingunum.

## Finnbjørn einsamallur

Í almenna bólkinum eru seytjan luttakarar. Har verður telvað átta umfør. Síðsta umfarið verður á skránni páskaaftan.
Eftir trý tey fyrstu umførini var Finnbjørn Vang úr Klaksvíkar Talvfelag einsamallur á odda við fullum stigatali. Bernhard Augustinussen var næstfremstur við 2 1/2 stigi. Hann er úr Sandavági. Sjey telvarar høvdu tvey stig: Andrias Ziska, HT, Ingolf Gaard, KTF, Jákup á Rógvu Andreasen, VT, Jákup D. Joensen, HT, Bárður Joensen, VT, Heðin Joensen, ST og Jóannes Ortind, ST.



# Mølby til Hull

**Danskir fjølmiðlar vistu týsdagin at siga, at fyrrverandi danski landsliðsspælarin Jan Mølby verður nýggjur venjari hjá Julian Johnsson í Hull City. Hvørki felagið ella Mølby hava tó váttað tíðindini enn**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Julian Johnsson fær møguliga ein navnframan danskan venjara í teimum seinastu dystunum í hesum kappingarárinum.

Tey donsku bløðini B.T. og Ekstrablaðið skrivaðu týsdagin, at Jan Mølby verður eftir ætlan nýggjur venjari í Hull City, har Julian hevur spælt síðan fjørsummar.

Enn er eingin sáttmáli undirskrivaður, og tí eru hesi tíðindini enn at meta sum leysatíðindi.

Brian Little segði seg úr starvi, eftir at Hull hevði verið í einum aldudali, og síðani tað hevur ungdómsvenjarin verið í fyribils starvi. Nú ganga tíðindi so um, at tað er Jan Mølby, sum skal í heita sessin.

Jan Mølby er í løtuni venjari hjá Kidderminster Harriers, sum eisini spælir í ensku 3. deild. Kidderminster og Hull liggja lið um lið í stigatalvuni, og tey kappast um møguleikan at spæla uppflytingardyst.

Jan Mølby var kendur spælari í sínari tíð, tá hann spældi við Liverpool og Ajax. Harumframt hevur hann spælt fleiri dystir við danska landsliðnum.

FØROYA TELE Cup

EM liðini skipa saman við Føroya Tele fyri stórfingnari parakapping í Bridgehúsinum í Havn 6. apríl kl 10.00.

Pláss er fyri 40 pørum til kappingina.

Seinasta freist at boða frá luttøku er mikukvøldið 3. apríl hjá Boga Simonsen (tel 318811 ella 228596) ella hjá Marjun Restorff (tel 319142).

Spæld verða umleið 60 spøl, og kappingin verður ein barometerkapping.

Vinnandi parið fær eina GSM Nokia 3030 við 300 kr í talitíð í part. Parið, ið endar sum nr 2, fær eina tráðleysa fastnetstelefon í part. Harafturat verða nógv gávukort frá ymsum handlum at vinna.

Møtið upp 6. apríl og verið við til at stuðla EM luttøkuni hjá føroysku landsliðunum!

StÍF-Neistin 29-26 (13-12)

# StÍF basti Neistanum

**Mansliðið hjá StÍF vann týdningarleysa dystin móti Neistanum mánakvøldið. Úrslitið av dystinum broytti einki uppá stigatalvuna**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Seinasti dysturin í landskappingini hjá monnum varð leiktur í høllini á Skála mánakvøldið millum StÍF og Neistan. Dysturin varð útsettur frá vikuskiftinum vegna jarðarferð.

StÍF vann dystin við trimum málum eftir at hava verið á odda við einum máli við steðgin.

Dysturin var merktur av, at einki var at spæla fyri. StÍF fekk bronsuna, og Neistin fekk silvurmerkini eftir dystin. Eftir var bara æran at spæla fyri, og strandingar vóru tó stinnari tá avtornaði.

## Neistin betri byrjan

Tað vóru havnarmenn, ið komu best frá byrjan, og teir løgdu sjógv ímillum beinanvegin. Tá hálvleikurin var hálvrunnin, var Neistin frammanfyri við fýra málum.

Dysturin vendi brádliga, tá StÍF tók annað skinn um bak. Eftir lítlari løtu hevði heimaliðið vent dystinum og var frammanfyri við hálvleikssteðgin.

Neistin megnaði ongantíð at fáa StÍF aftur í seinna hálvleiki, og heimaliði førdi frá byrjan til enda. Heini Joensen hevði einaferð møguleikan, men hann brendi brotsskastið.

StÍF fór sostatt við báðum stigunum og endaði á triðja plássi. Neistin mátti taka til takkar við silvurmerkjunum í landskappingini eins og í steypakappingini. Havnarliðið mundi hava væntað sær í minsta lagi eitt gullmerki undan kappingarárinum.

**Dysturin í tølum:**
StÍF – Neistin **29-26 (13-12)**
StÍF: Bent Djurhuus 7, Alexandur Johansen 6, Artur Johansen 6, Leivur Justinussen 4, Jón Rasmussen 3, Andre F. Danielsen 2, Anfinnur Joensen 1
Neistin: Heini Joensen 11, Kári Mortensen 4, Jacob Jónsson 3, Birgir Kass 3, Helgi Justinussen 2, Ragnar Stakksund 1
Útvísingar: StÍF 2, Neistin 2
Brotskøst: StÍF 4, Neistin 2
Dómarar: Uni Wardum og Hannis Wardum



*Savnsmynd*

BRIDGE:

# Landsliðini hita upp til EM í Suðurjútlandi

*Bogi Simonsen og Arnbjørn Sivertsen*

Føroysku landsliðini skulu um páskirnar til Graasten í Suðurjútlandi at leika í kapping. Mótstøðuliðini verða Svøríki, Týskland og Danmark, ið øll teljast millum stinnastu bridgetjóðir í heiminum.

Kappingin í Graasten er liður í venjingin og upphitingin til EM kappingina í Italia í summar. Spælt verður leygardagin og sunnudagin 30. og 31. mars.

Danmark og Føroyar taka lut við tveimum liðum í part í opnum rað og einum í kvinnurað. Hini bæði londini koma við einum liði í hvørjum raði.

Tey føroysku liðini síggja soleiðis út:
Føroyar I: Bogi Simonsen - Rói á Rógvu Joensen, Jóannes Mouritsen - Heðin Mouritsen.

Føroyar II: Arnbjørn Sivertsen - Hans Jacob Petersen, Árant Berjastein - Magni Jøkladal.

Føroyar kvinnur: Marjun Restorff - Arnleyg Mikkelsen, Jóna Grunnveit - Majken Johansen, Maria Christiansen - Laila Danielsen.

Jóannes er veteranurin á føroyska liðnum. Hann hevur leikt flestar landsdystir fyri Føroyar, 49 í tali, men eisini Bogi (30 dystir) og Heðin (19) eru royndir í altjóða leiki. Einasti debutantur á føroyska landsliðnum verður Magni. Á kvinnuliðnum eru Majken, Maria og Laila við á fyrsta sinni.

Teir kendastu leikararnir eru teir á danska A liðnum. Peter og Dorthe Schaltz hava bæði fleiri hundrað landsdystir á baki, og ikki so nógv minni kendir eru Jens Auken, Lars Blakset, Lauge Schaffer og Mathias Bruun.

Tey føroysku landsliðini arbeiða hart við at fáa endarnar at røkka saman til EM luttøkuna. Uttan stuðul høvdu útreiðslurnar farið upp um 300.000 kr. Vit hava møtt vælvild frá EM fyrireikarunum, sum hava givið stóran avsláttur í kost og logi, og fleiri stuðlar her heima hava longu bjóða seg fram. Men enn er langt eftir á mál, um ikki leikararnir sjálvir skulu gjalda bróðurpartin av útreiðslunum. Fleiri tiltøk verða í næstu framtíð, m.a. Føroya Tele Cup 6. apríl og eitt tiltak í SMS 21. - 25. maj.

Føroyska landsliðið hevur tikið lut í NM 9 ferðir, og tað er vorðið til 90 landsdystir tilsamans. Fyrstu ferð var í Helsingør í 1984, og eftir øllum at døma verður kappingin í Íslandi í 2000 tann seinasta NM kappingin. Orsøkin er tann, at EM nú verður spælt hvørt ár í staðin fyri annaðhvørt, og tí verða helst ikki stundir og ráð eisini at spæla NM.

**Føroyskir landsdystir**
Opið rað

| *Navn* | dystir |
|---|---|
| Jóannes Mouritsen | 49 |
| Helgi Joensen | 46 |
| Rúni Mouritsen | 40 |
| Niels Nielsen | 38 |
| Per Kallsberg | 38 |
| Bogi Simonsen | 30 |
| Egil Sondum | 30 |
| Dánjal Pauli Mohr | 28 |
| Árni Dam | 19 |
| Heðin Mouritsen | 19 |
| Marner Joensen | 19 |
| Egil Helmsdal | 19 |
| Ingi Helmsdal | 19 |
| Eyðun Jensen | 19 |
| Pól Joensen | 18 |
| Arne Mikkelsen | 10 |
| Rói á Rógvu Joensen | 9 |
| Áki Mouritsen | 9 |
| Trygvi Vestergaard | 9 |
| Árant Berjastein | 7 |
| Símin Lassaberg | 7 |
| Hans Jacob Petersen | 6 |
| Arnbjørn Sivertsen | 6 |